# Djórahøvd og hvalavasar

*Fólkakroppar við djórahøvdum og vasar, ið líkjast hvalasveivum hanga og standa á veggjum og gólvum í Smiðjuni í Lítluvík nú um dagarnar.*

Rúnar Reistrup

Ein heldur sermerkt framsýning er í hesum døgum at síggja í Smiðjuni í Lítluvík, har føroyingurin Vígdis Petersen og danin Anne Mette Edeltoft saman sýna fram ólíku verk síni.

Báðar listakvinnurnar eru útbúnar á Danmarks Designskole. Anne Mette Edeltoft sum teknari og málari og Vígdis Petersen sum keramikari.

Anne Mette Edeltoft starvast dagliga sum illustrator á einari danskari teknistovu, har hon mest av øllum teknar til ymsar bøkur og aðrar útgávur. Harumframt hevur hon teknað og skrivað tríggjar egnar barnabøkur og arbeiðir við teirri fjórðu.

Stílurin í málningum hennara á veggjunum í Smiðjuni kann eisini tykjast eitt sindur barnsligur við fyrsta eygnabrá. Hetta kemst einamest av, at allir persónarnir á myndunum hava fólkakropp og djórahøvd, men verður eisini undirstrikað av reinu linjunum í myndunum.



*Spiralurin er tað gjøgnumgangandi temaið í framsýndu verkunum hjá keramikaranum Vígdis Petersen.*

Sjálv sigur Anne Mette, at hon fær íblástur til málningar sínar frá millum øðrum ævintýrum og orðatøkum, har djór verða nýtt sum samanberingar við persónsmenskur.

Og tað eru nevniliga persónsmenskur, sum klárast lýsa út úr myndunum hjá donsku listakvinnuni, ið allatíðina brúkar ein undirtóna av skemti í sínum verkum.

### Sveiv og nev

Vígdis Petersen stendur fyri tí trýdimensionella partinum av framsýningini. Av skapum eru tað serliga tvey, ið ganga aftur. Annað er tað runda keramiska fatið og hitt er eitt vasaskap, sum líkist mest eini hvalasveiv, um sæð verður beint á tað, men broytir skap og líkist einum svangum opnum fuglaunganevi, um tú stendur uppi yvir tí.

Munurin á teimum ymsu verkunum við líknandi skapum er málingin og brenningin, ið er rættiliga sermerkt. Vígdis brúkar ein eysturlendskan brenniteknikk kallaður raku, har keramiski luturin verður tikin úr ovninum, meðan hann er túsund hitastig. Síðan verður hann annaðhvørt koyrdur niður kalt vatn ella díktur undir við sæðuspønum, alt eftir um ein ynskir ein sprekkaða yvirflatu í málingini ella eina kolasvarta brenning á lutinum.

Umframt stóru keramisku lutirnar hevur Vígdis eisini smærri keramiskar veggjalutir við á framsýningini. Her er talan um keramikformar á træ og nøkur fá verk, har keramikarin hevur brúkt beton á træ.

### Hongur saman

Á framsýningini er ein ávísur spenningur millum verkini hjá báðum listakvinnunum. Keramisku verkini, sum Vígdis Petersen hevur valt at sýna fram, eru nokkso grovkornað og standa soleiðis í andsøgn til ta óvanliga reinu linjuna í málningunum hjá donsku listakvinnuni.

Kortini hongur framsýningin saman. Spiralformaðu linjurnar í keramisku verkunum leiða yvir til rundu linjurnar á málningunum, og djórhøvdini á hesum seta keramikkin í eitt meira óhátíðarligt og lætt ljós enn keramikkur plagar at standa í.

Samanspælið millum teir fløtu og skuggaleysu málningarnar og trýdimensionellu lutirnar á gólvinum riggar eisini væl.

Framsýningin í Smiðjuni í Lítluvík er opin millum klokkan 14.00 og 19.00. Í morgin, hósdagin, letur hon aftur fyri seinastu ferð.





*Stílurin hjá Anne Metta Edeltoft er djórahøvd á menniskjakroppum og hesin gongur aftur í øllum hennara málningum, sum verða sýndir fram í Smiðjuni.*

# Landsstýrismaður í grindadrápi



Jústinus Leivsson Eidesgaard

**Klaksvík:** Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann annað enn at brúka teljurekkjuna. Í grindini í Klaksvík sunnudagin, var hann rættuliga í essinum, tá 98 hval løgdu beinini. Myndamaður okkara læsti Karstin Hansen fastan í myndini, meðan hann hann er í ferð við at hála ein hval upp á land. Hetta er ikki fyrstu ferð, at Karstin Hansen er í grind. Hann hevur verið løgreglumaður í mong ár og sýslumaður seinastu árini og tí veit hann alt um grind og grindabýti.



# Skundið tykkum spakuliga

*Føroyingar eiga ikki at skunda sær. Tíðin arbeiðir fyri eini oljutjóð, sigur fyrrverandi norski oljumálaráðharrin Finn Lied. Hann meinar at føroyingar eiga at gera sum norðmenn hava gjørt. Tað er nú framtíðin sum møgulig oljutjóð skal skapast, sigur hann.*

Jógvan H. Gardar, Oslo

Hann dugir ikki at síggja nakað mistak í norska oljupolitikkinum sum eigur at ræða føroyingar. Norski oljupolitikkurin hevur verið til tað besta fyri norsku tjóðina sigur Finn Lied.

Finn Lied var norskur ídnaðarmálaráðharri tá norðmenn fóru undir oljuvirksemi fyrst í sjeytiárunum. Hann stóð á odda fyri tí arbeiðnum sum legði lunnar undir oljupolitikkinum sum Noreg hevur fylgt síðani.

- Tíðin tá eingin veit um olja ella gass er at finna er sera spennandi – ein vónar at okkurt er har, samstundis sum ein ikki kann tilrættaleggja íløgur sum um ein fær inntøkur frá vinnuni í framtíðini. Tað er her føroyingar eru í dag, sigur Finn Lied í samrøðu við Sosialin.

Hann hevur ikki fylgt neyvt við í tí sum hendir í Føroyum í hesum døgum, men meinar at tað tykist sum um man hevur valt eina leið sum hann meinar kann vísa seg at vera tann rætta.

- Vit høvdu einki oljuumhvørvi sum kundi byggja út eina norska oljuvinnu. Vit kundu havt latið alt uppí hendurnar á útlendskum oljufeløgum uttan at læra nakað sjálvi, men vit vildu læra okkara egnu fólk upp.

Tú kanst siga at vit fóru ein biltúr har vit fyrst sótu aftanfyri; síðani fluttu vit til plássi við síðuna av bilstjóranum har vit eygleiddu bilstjóran fyri at læra hvussu hann stýrdi bilinum. Í dag sita vit sjálvi og stýra bilinum. Vit vildu stýra oljuvinnuni sjálvi, men vit vóru noydd til at brúka tíðina til at læra okkara fólk til hesar krevjandi uppgávurnar. Í dag er tað eingin sum heldur tað vera løgi um føroyingar leita sær oljuvitan í Noregi, tí vit hava víst at vit duga, sigur ein ikki sørt stoltur Finn Lied.

Hann meinar at føroyingar sjálvir eiga at vera við í so nógvum sum gjørligt í samband við oljuleitingina. Hann leggur stóran dent á at tað almenna eigur at hava fingrarnar við í spælinum, og heitir á føroyingar um at byggja upp eitt oljufelag á sama hátt sum Noreg gjørdi tá Statoil varð stovnsett. Statoil hevur umframt at skula tryggja sær sjálvum pengar eisini umsiti tær beinleiðis inntøkurnar hjá norska statinum í olju- og gassvinnuni.



### Hugsi um eftirkomararnar

Finn Lied meinar at tað einasta rætti er at byggja upp eitt tjóðarligt oljufelag sum skal vera við til at tryggja komandi oljuinntøkur og tryggja at vitanin um olju og gass eisini verður latin egnum fólki.

- Skundi tykkum spakuliga og hugsi langt inn í framtíðina, sigur Finn Lied, og sipar til at komandi ættarlið eisini skulu kunna njóta gott av møguligum olju- og/ella gassinntøkum.

- Oljutíðin má ikki gerast til eitt stutt kapittul men til eitt so langt tíðarskeið sum møguligt. Tað er av alstórum týdningi at ikki verður fari ov skjótt fram. Hugsi tykkum um Noreg ikki hevði tryggja sær inntøkurnar sum vit hava gjørt. Eingin trúði at vit høvdu olju í okkara undirgrund. Hon var har, og metingar fyri fáum árum síðani um hvussu long norska oljuøldin verður hava víst seg ikki at passa. Vit vita í dag við vissu um fleiri ferðir so stórar oljukeldur í dag, samanborið við tað vit vistu fyri bara 4-5 árum síðani. Og framvegis eru økir sum kunnu vísa seg at hava stórar olju og gasskeldur, sigur Finn Lied.

- Hav ís í maganum. Tað eru tit sum hava ognarrættin til undirgrundina, og tit avgera ferðina. Læri av Noregi og hava tit brúk fyri hjálp so ivist eg ikki í at norska oljuumhvørvi vil rætta tykkum eina hjálpandi hond.

### Móti Stoltenberg

Finn Lied er orkuserfrøðingur og fylgir væl við. Hóast næstan 87 ára gamal, so luttekur hann dúgliga í orðaskiftinum. Í vár setti hann saman við øðrum gomlum javnaðarhøvdingum sum Haakon Lie og Jens Chr. Hauge í Arbeiderpartiet í gongd eina rørslu innan norska javnaðarflokkin sum hevur sum mál at steðga privatiseringsætlanunum hjá leiðsluni í flokkinum. Forsætisráðharri Jens Stoltenberg, oljumálaráðharri Olav Akselsen og flokksleiðari Thorbjørn Jagland saman við øðrum í flokksleiðsluni ynskja at at lata privatar íleggjarar sleppa inn í Statoil.

Hesir tankarnir sum frammanundan bert Høyre og aðrir flokkar á høgravonginum hava tora at nevnt eru nú blivnir til javnaðartankar. Men Finn Lied er í øðini. Á landsfundinum hjá Arbeiderpartiet í november lovar hann at Stoltenberg og onnur privatiseringshugaði skulu setast uppá pláss. Umframt teir gomlu høvdingarnar hevur Finn Lied eisini fingið ungdómsrørsluna hjá flokkinum, AUF, við í stríðnum móti Stoltenberg. Ætlanin hjá Jens stoltenberg var at Statoil skuldi verið privatisera longu áðrenn summarferiuna. Men tað var áðrenn gamle leyvan vaknaði í Finn Lied og vinmonnum.

- Eg kenni væl Jens, og havi einki ímóti honum, men í hesum málinum fer hann skeivur. Statoil hevur verið trygdin hjá norsku borgarunum fyri at oljuvinnan skal tryggja norskum borgarum eina góða framtíð. Sleppa vit privatum og útlendskum íleggjarum framat í Statoil so missa vit stýringina, sigur Finn Lied. Hann hyggur skeivt uppá ein, um ein vísir til at tað bert eru partar av Statoil sum skulu privatiserast.

- Antin er tað privat, ella so er tað alment. Hatta møsni um at partar kunnu privatiserast, samstundis sum staturin kann halda fram við at stýra er als ikki satt. Allar royndir sum norski staturin kann vísa til á hesum økinum vísir at sleppa privatir íleggjarar framat, so missir staturin ávirkan, ella letur vera við at brúka sín møguleika til at ávirka. Hygg bara eftir Norsk Hydro. Hóast staturin er størsti eigari, so heldur staturin seg yvirhøvur burturi og roynir ikki at ávirka leiðsluna í Hydro

Finn Lied leggur dent á at Statoil-tankin kanska er tann týdningarmiklasti í allari oljusøgu Noregs, og kanska høvuðsorsøkin til at norðmenn hava fingið so nógv burturúr.

- Tí meini eg at Statoil ikki má privatiserast – óansæð um talan er um heilella fyri-ein-part-privatisering. Noreg hevur higartil havt ein sera góðan oljupolitikk, sum føroyingar kunnu læra nógv av. Eg dugi ikki at vísa á nakað mistak sum orsøk er til at vera keddur av. Í løtuni arbeiða partar av Arbeiderpartiet við at gera eitt stórt mistak gjøgnum privatisering av Statoil, men so leingi veiggj er í mær so skal eg stríðast fyri at hetta ikki verður framt.

Náttúruríkidømi hoyrir til fólkið, og skal ikki vera eitt virðisbræv sum flýgur aftur og fram á virðisbrævamarknaðinum.

## Næstan 300 mia. krónur í norska oljugrunninum

*Nógv tann størsti parturin er settur í virðisbrøv og partabrøv*

Orðini vóru ikki tey nógvu, tá roknskapurin hjá norska oljugrunninum fyri apríl ársfjórðing bleiv lagdur fram mánadagin, tí sambært uppgerðini hevði grunnurin ongan vinning havt hesar tríggjar mánaðarnar.

Varastjórin í Norges Bank, sum umsitur grunnin, vísti á, at hjá einum so stórum grunni er tað ikki úrslitið í einum einstøkum ársfjórðingi, sum er avgerandi, men heldur hvat grunnurin fær burturúr upp yvir eitt longri tíðarskeið.

Virðislækkingar á partabrævahandlinum í USA, Japan og í Evropa góvu grunninum eitt negativt úrslit upp á 1,7 prosent í apríl ársfjórðingi, meðan virðisbrøvini góvu eitt positivt úrslit upp á 1,2 prosent. Samanumtikið hevði grunnurin ein vinning upp á 2,4 prosent fyrra hálvár í ár, men tað var lítið samanborið við fyrra hálvár í fjør, tá vinningurin var heili 12,4 prosent.

### Uttanlands

Norska fíggjarmálaráðið hevur givið Norges Bank loyvi at seta pengarnar hjá grunninum í virðisbrøv og partabrøv í tilsamans 21 londum. Men londini eru ikki tilvildarliga vald, tí talan er um tey ríkastu londini í heiminum, sum aftur tryggjar, at grunnurin kann vænta sær vinning av íløgunum, og at vandin fyri missi er lítil.

Sum er hevur norski oljugrunnurin einar 160 mia. krónur standandi í útlendskum virðisbrøvum, og einar 100 mia. krónur eru settar í partabrøv.

Sambært varastjóranum í Norges Bank hevur leiðslan í oljugrunninum ongar ætlanir um at víðka talið á londum, sum eru egnað at gera íløgur í, men grunnurin fylgir alla tíðina við búskapargongdini í nógvum londum, leggur hann afturat.

### Umhvørvisgrunn

Norski oljugrunnurin verður umsitin eftir teimum marknaðarpolitisku treytunum, og tað er sjáldan, at politisku myndugleikarnir ella politikarar yvirhøvur umrøða virksemið hansara.

M. a. hava fleiri umhvørvisfelagskapir kravt, at oljugrunnurin skal stuðla umhvørvisvernd. Hetta er m. a. komið fram, tí grunnurin hevur sett pening í útlendskar stórfyritøkur, sum verða lagdar undir at oyða skógarlendi og harvið hótta umhvørvið, men higartil hava atfinningar sum hendan ikki vunnið frama.

Kortini hevur leiðslan í grunninum samtykt at seta eina lítla mia. krónur í ein serligan umhvørvisgrunn. Virksemið hjá hesum grunninum verður tó ikki ásett fyrr enn í almennu fíggjarlógini næsta ár.